# Javnstøða í Mettustovu í annaðkvøld

**Í annaðkvøld klokkan 19** skipar Demokratia fyri fyrilestri í Mettustovu í Skipara Hansensgøtu úti á Reyni í Havn. Tað er Dorthe Gyldenkærne, HR mennari, sum millum annað ferð at røða um, hvussu tú finnur tína innaru styrki at standa fram og føra út í lívið tað, sum hjartað brennir fyri. Tiltakið er ætlað kvinnum, sum ætla at gera sína ávirkan galdandi í politiska lívinum, men øll eru hjartaliga vælkomin, siga fyrireikararnir.



# Myndaframsýning

Fríggjadagin 5. Mars 2010 kl. 17.00 letur upp fotoframsýningin "UNDERBARN - EXTRAORDINARY CHILD" í Norðurlandahúsinum. Á framsýningini kunnu síggjast fotomyndir hjá amerikanska fotografinum Mary Ellen Mark, og íslendska fotografinum Martin Bell. Myndirnar siga frá um gerandisdagin hjá brekaðum børnum í Íslandi og lívi teirra sum so. Framsýningin er ein samstarvsverkætlan millum Tjóðarsavn Íslands, Aðalkonsulát Íslands í Føroyum og Norðurlandahúsið í Føroyum. Framsýningin er í húsinum til og við sunnudagin 21. mars 2010 kl. 17.00.





*Tvey skip standa uppi á bedingini í Havn í løtuni. Tey eru línuskipið Venus og strandfaraskipið Ternan*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# av várfiski við snellu

Bátafiskur á Eiði tekur eisini ímóti fiski frá bátum, sum royna við línu, og seinasta leygardag avreiddi glastrevjabáturin Gunnvá, sum er heimahoyrandi á Norðskála, heili 14.000 pund, sum teir fingu norðanfyri. Størsti parturin av veiðini hjá Gunnvá var toskur.

Aðrir bátar, sum royna við línu og avreiða á Eiði, hava eisini havt góðar setur og hava ligið millum eini 8.000 og 11.000 pund.

Men tað er ikki bara á Eiði, at snellufiskur kemur upp á land í hesum døgum. Nógvir snellubátar avreiddu eisini í Sørvági mánadagin, og aftur í gjár vóru menn verið á útróðri.

Mánadagin avreiddu fleiri snellubátar í Sørvági, har landingarmiðstøðin viggar fiskin hjá bátunum, sum síðan verður seldur um uppboðssøluskipanina hjá Fiskamarknaði Føroya.

Bátar úr eitt nú Vágum, Sandoy og Norðurstreymoy, sum hava avreitt í Sørvági, hava ligið úr smáum 200 pundum upp í 2.000 pund á bátin.

Sagt verður úr Sørvági, at bátarnir høvdu góð 11 tons tilsamans í mánadagin, og meginparturin av veiðini var toskur.

Týsdagin vóru eisini fleiri bátar við snellu, men vit hava ikki frætt, hvussu hevur vignast síðan mánadagin.

# Partrolarar rokast í upsa

**Ísfiskatrolararnir Heykur og Falkur hava lagt eina av størstu ísfiskalastunum upp á land, sum nakrantíð er landað í Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heykur og Falkur fóru út næst seinasta fríggjadag og landaðu mánadagin yvir 600.000 pund av upsa í Saltangará. Hetta er ein rættiliga stórur túrur, og er helst ein hin størsta ísfiskalastin, sum nakrantíð er landað í Føroyum.

Í gjár landaðu ísfiskatrolararnir Rókur og Lerkur í Saltangará. Teir fóru út seinasta fríggjadag og hava góð 400.000 pund eftir bert fáum fiskidøgum.

Jaspis og Ametyst vóru eisini inni í gjár við umleið 300.000 pundum, sum teir hava fingið eftir einari viku.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn siga tey, at umleið 22 landarar eru í gongd, tá mest er at gera - og inni í móttøkuni taka onnur 10-12 fólk fiskin undan.

### Nógvir tímar

Á Kongshavn upplýsa tey, at einir 600-700 tímar vóru til landarar og móttøkufólk í seinastu viku.

- Hetta er besta upsatíð, og í løtuni fáa skipini rættiliga nógvan fisk, verður sagt úr Saltangará.



*Falkur og Heykur settu kanska met, tá teir landaðu í Saltangará mánadagin*

# Skip í Klaksvík

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu tvey línuskip í Klaksvík. Klakkur hevði 90.000 pund av brosmu og longu, og Kvikk hevði sløk 80.000 pund, meginparturin var hýsa. Trolbáturin Fiskaklettur landaði eisini í Klaksvík í mánadagin. Teir høvdu sløk 54.000 pund tilsamans, harav 29.000 pund var upsi og sløk 10.000 pund havtaska.

Í dag koma línuskipið Jákup B undan Íslandi og trolbáturin Varðin undan Føroyum.